# Alexander Kielland

Eitt av best kendu nøvnum um Stavanger leiðina er rithøvundurin Alexander Kielland, sum var føddur í Stavanger 18. februar 1849. Saman við Henrik Ibsen, Bjørnstjerne Bjørnson og Jonas Lie verður Kielland roknaður sum ein av teimum fýra stóru norsku rithøvundunum í 19. øld. Í miðbýnum í Stavanger er ein standmynd reist av Alexander Kielland, og í Oslo er eitt stað sum eitur Alexander Kiellands plass. Alexander Kielland andaðist 6. apríl 1906, 57 ára gamal. Navnið er eisini kent frá hotellboriplattforminum Alexander Kielland, sum koppaði í Norðsjónum 27. mars 1980, har 123 fólk av teimum 212 fólkunum umborð lótu lív .






















